LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 51/2018 eftir TS § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, um teldutøka savnið hjá Beta files**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Eru tvær milliónir kr. tøkar í ár til gransking av Beta Files tilfarinum?
2. Hvørji stig eru tikin til tess at kunna um, fáa sett gongd á og harvið fremja Løgtingsins vilja at byrja fiskivinnugransking í teldutøka tilfarinum hjá Beta files. Eru samráðingar tiknar upp við nevndina og Runavíkar Kommunu?
3. Kann løgmaður upplýsa, um nakrar granskingarumsóknir eru komnar og nær granskingararbeiðið byrjar?

**Svar:**

**Til 1:** Eg kann upplýsa fyri løgtingsmanninum Kára P. Højgaard, at sambært løgtingsfíggjarlógini 2019 er 1 mió. kr. tøk til endamálið. Ætlanin er, at Fróðskaparsetur Føroya skipar hetta sum eina ph.d. verkætlan komandi árini. Sambært upplýsingum Mentamálaráðið hevur fingið frá Fróðskaparsetrinum, fer ein tílík verkætlan at kosta samanlagt uml. 2.2 mió. kr. komandi 2-3 árini.

**Til 2:** Mentamálaráðið hevur havt fund við avvarðandi hjá Beta og Runavikar Kommunu. Mentamálaráðið hevur eisini sett seg í samband við tey, sum hava við gransking at gera, tvs. Granskingarráðið, Fróðskaparsetrið og Landsskjalasavnið og viðgjørt við hesi, hvussu best verður granskað fyri játtaða peningin. Talan hevur verið um kunnandi fundir. Mentamálaráðið hevur ikki mett, at tað er ráðsins skylda at fara í samráðingar um at granska í skjølum, sum longu hava fingið játtan á løgtingsins fíggjarlóg. Tað, sum higartil fyriliggur í málinum er, at Mentamálaráðið hevur, eftir áheitan, fingið eina lýsing frá Fróðskaparsetrinum/Søgu- og samfelagsdeildini, um eina verkætlan í samband við Beta files. Fróðskaparsetrið/Søgu- og samfelagsdeildin metir tað vera sera áhugavert at fáa í lag eina ph.d. verkætlan um føroyska fiskivinnusøgu við m.a. skjølunum hjá Beta sum grundarlagi. Mentamálaráðið hevur síðan heitt á Fróðskaparsetrið um at fyrireika málið sum eina ph.d. verkætlan.

**Til 3:** Eg kann upplýsa løgtingsmannin um, at ongar granskingarumsóknir eru komnar, og at granskingararbeiðið ikki er byrjað. Málið er í næstum, undir leiðslu Setursins, at lýsa eftir granskingarfólki, so at farast kann undir hesa áhugaverdu verkætlan.

Í Tinganesi, 8. mars 2019

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo